Málrok í Sørvági

Klaksvíkingar enda›u ári› vi› einari rættiligari málveitslu, tá teir leygardagin vóru á vitjan í Sørvági, har kappingarári› er longt vi› tveimum dystum

Jákup Mørk

Ta› vóru bert vágamenn, sum høvdu naka› at spæla fyri, tá teir sunnudagin vóru vertir fyri klaksvíkingum, sum fyri fyribils seinastu fer› kundu rópa seg verandi føroyameistarar.

Møguliga var vandin fyri ni›urflyting tó ov stórt tr‡st hjá heimali›num, tí fyrstu løtuna var skili› á spælinum alt anna› enn gott. Me›an teir á heimali›num runnu sum fluga í fløsku, kundi KÍ vi› tveimm skjótum málum leggja seg á odda.

Vendu upp aftur

Samstundis frættist, at Sumba hev›i lagt seg á odda móti HB, og heilt fram til ste›gin, tá HB hev›i vent dystinum har su›uri, vóru vágamenn sostatt í næstbestu deildini.

Á›renn fari› var› til ste›gin, hev›i Bakus tó minka› um munin, og sum skilst har vesturi, so hev›i heimali›i› rættiliga gott tak á gestunum seinasta hálva tíman av fyrra hálvleiki.

Klaksvíkingar noyddust at vera bæ›i Jan Joensen og Rógva Jacobsen fyri uttan í dystinum. Rógvi er í løtuni í Noreg og venur vi› Sogndal, me›an Jan ikki var klárur, eftir snuddin, hann fekk undir venjingini hóskvøldi›.

Hetta tóktist tó ikki at nerva klaksvíkingarnar, sum spældu fullkomuliga frígjørt, og seinni hálvleikur var ikki gamal, á›renn Marek og Ey›un Klakstein høvdu økt munin upp í 4-1.

Vágamenn spentu nú bogan høgt í eini roynd at fanga KÍ aftur, og ta› var eisini um reppi›, at hetta gav úrslit.

Vi› málum frá John Johansen og Bakus, minka›u teir munin ni›ur í eitt mál , og hev›i ta› ikki veri› fyri óney›uga brotssparki›, sum Harley setti í neti›, kundi seinasta máli› á árinum møguliga givi› eitt stig.

Nú gjørdist talan um enn eitt tap hjá vágamonnum, men tá Sumba samstundis tapti sín dyst, kosta›i tapi› einki hjá heimali›num.

Gó›ar vónir

Á›renn vágamenn kunnu vera vísir í, at teir eisini kunnu hava eitt fyrstudeildarli› komandi kappingarár, skal li›i› spæla tveir dystir móti fuglfir›ingum, sum gjørdust nr. 2 í næstbestu deildini.

Páll F. Joensen, sum hevur veri› hjálparvenjari hetta kappingarár›, heldru, at hóast talan var um tap móti KÍ, so eru vónirnar undan hesum bá›um seinastu dystunum hampuliga gó›ar.

– Spæli› var til tí›ir á eini gó›ari lei›, men KÍ fekk nøkur bílig mál, sum gjørdu, at vit taptu dystin. Kunnu vit halda fast í teimum positivu lutunum í dystinum, eiga vit at klára teir bá›ar dystirnar móti fuglfir›ingum, helt hann, tá vit eftir dystin spurdu hann um vónirnar fyri fyrstu deildarfótbólti.

Ta› ver›ur tó ein missur fyri vágamenn, at teir mugu vera Hannus Olsen fyri uttan í fyrra dystinum. Hann var ein av trimum leikarum, sum fekk rey›a korti› í dystinum, hóast Páll helt, at talan ikki átti at veri› um naka› reytt kort yvirhøvur.

Ey›un Klakstein var hesufer› fyrsta vali› í álopinum, og hann takka›i fyri áliti› vi› at skjóta eitt av KÍ-málunum

Mynd: Edvard Joensen

Hjá klaksvíkingum er nú bert eftir at líta fram móti komandi kappingarári›. Hetta ári› gera teir best í at gloyma sum skjótast, tí meira enn naka› anna› li›, ver›ur KÍ í ár mett sum stóra vónbroti›. Ári› hevur mest veri› álíkt einnum antiklimaksi›, har li›i› ongantí› vann seg upp aftur, eftir at teir bá›ir fyrstu dystirnir enda›u vi› tapi.

Einki er tó at ivast í, roknast eisini skal vi› klaksvíkingum komandi kappingarár. Fótbóltsevnini á li›num eru framúr, og kann hugbur›urin rættast móti tí, sum var galdandi í fjør, eiga hei›ursmerki í øllum førum at standa á skránni komandi ár.

FS Vágar-KÍ 4-5 (1-2)
0-1 Niclas Niclasen 4
0-2 Ove Nysted 12
1-2 Rimvydas Bakus 35
1-3 Marek Vierzbicki 56
1-4 Ey›un Klakstein 63
2-4 John Johansen 65
3-4 Rimvydas Bakus 70
3-5 Harley Bertholdsen 80 (br.)
4-5 Birgir Joensen 90

Dómari:
Petur Hansen (LÍF)

FS Vágar:
Remigius Mikocionis – Høgni Ole-Jacobsen, Zylvanius Zudis, He›in Joensen – Kim Poulsen, Hannus Olsen, Ari Thomassen, Rimvydas Bakus – John Johansen, Birgir Joensen, Igoris Kirillovas.

KÍ:
Zoltan Kujundric – Jan Andreasen, Símun Waag Høgnesen, Niclas Niclasen – Harley Bertholdsen, Hjalgrím Elttør, Marek Wierzbicki, Anhold Joensen, He›in á Lakjuni – Ey›un Klakstein, Ove Nysted.

EB/Streymur enda›i vi› sigri

2. deild. *Hóast uppflytingin var› tryggja›, vildu sundalagsmenn fegnir vinna seinasta dystin móti NSÍ. Hetta eydna›ist eisini móti endanum, tá Jákup Martin Joensen avgjørdi dystin vi› tveimum málum*

Stefan í Skorini

Hóast teir høvdu viljan at vinna var torført at bróta ígjøgnum ta treisku NSÍ verjuna, sum stó› stinn største partin av dystinum, men móti endanum megna›i heimali›i› ikki at standa ímóti meira. Jákup Martin Joensen, sum gjørdi tvey mál fyri viku sí›ani, var aftur tvífaldur málskjútti hesufer›.

Í fyrra hálvleiki gekk ta› javnt á, men felagsli›i› EB/Streymur var kanska vi› yvirlutan. Teir høvdu tamarhald á stø›uni, og spældu seg eisini fram til nakrar málmøguleikar. Kaj Joensen hev›i ein stóran møguleika, og Finnbjørn Zachariassen hev›i eitt skot á stongina. Annars fór ikki nógv fram vi› bæ›i málini, og ta› eydna›ist ikki at skjóta mál fyri ste›gin.

Eftir ste›gin var líkt til, at EB/Streymur setti allar kreftir inn fyri at fáa vinnandi máli›. Oddali›i› hev›i stóra leikliga yvirvág, men ikki fyrr enn móti endanum eydna›ist ta› at fáa hol á.

Tá eini tjúgu minuttir vóru eftir at spæla, royndi Jákup Martin Joensen seg úr 20-metra fjarstø›u. Skoti› var gott, og málverjin megna›i ikki at bjarga. So var stø›an 1-0 til útili›i›. Naka› seinni var Jákup Martin Joensen aftur á rætta sta›num. Hann var› spældur leysur, men málverjin bjarga›i í fyrstu syftu. Jákup Martin fekk tó bóltin aftur og lyfti bóltin uppum tann hjálparleysa málverjan. 2-0 var stø›an, tá dómarin bríksla›i dystin av. Motivatiónin skorta›i kanska eitt sindur leygardagin, men sigurin kom í hús hóast alt.

EB/Streymur enda›i sostatt hetta sera væleydna›a kappingarári› vi› einum sigri á NSÍ inni í Runavík, sum ikki er ta› lættasta sta›i› at fara heimaftur vi› trimum stigum.

EB/Streymur hevur veri› sera sannførandi í ár, og ta› er uppibori›, at teir hava tryggja› sær sæti› í bestu mansdeildini.

Vinnarar av a›ru deild 2000. EB/Streymur

Mynd: SJ

Fagna›urin var sjálvandi stórur, tá umbo›ini frá FSF handa›u bæ›i steyp og hei›ursmerki til felagsli›i›

Mynd: SJ

Ta› ver›ur tó ney›ugt, at fáa naka› av n‡ggjum fólki til felagi›, tí lopi› frá næstbestu til bestu deildina er stórt, og ringt ver›ur at klára seg vi› somu manningini. Enn er ikki avgjørt, hvør ver›ur venjari hjá li›num, men Bergur Magnussen hevur roynst væl í ár. Hann hevur eisini royndir sum spælari frá bestu deildini, tá hann spældi fyri B36, har hann vann steypakappingina í 1991.

NSÍ-EB/Streymur 0-2 (0-0)
0-1 Jákup Martin Joensen
0-2 Jákup Martin Joensen

Sumba repar seglini

Bjargingarroyndin miseydnaðist ímóti HB, sum gjørdi sítt fyri at varðveita møguleikan at vinna FM

Seinasta bjargingarroyndin hjá Sumba miseydnaðist, og nú noyðist liðið at fara tungu leiðina niður í aðru deild

Sumbingar søgdu leygardagin fyri aðru ferð farvæl við bestu deildina. Teir søgdu eisini farvæl við útlendsku sáttmálaspælararnar. Um nakar av teimum fýra jugoslavunum fer at koma aftur til Sumbiar er ikki greitt, men tað er greitt, at teir í Sumba fara ikki komandi ár at rinda spælarum pengar fyri at hjálpa teimum við fótbóltinum:

– Vit eru ikki fleiri enn háltv triðja hundrað fólk í bygdini. Fíggjarliga grundarlagið undir felagnum er tískil tepurt, og tað er sera tungt at reka eitt fótbóltsfelag. Hesi trý árini, sum vit í hesum umfarinum hava verið í bestu deildini, hevur størsti denturin verið lagdur á besta liðið. Vit í nevndini hava viðgjørt spurningin, og vit hava ásannað, at tað er neyðugt hjá okkum at gera meiri við yngru deildirnar. Og um vit skulu gera tað, so ber ikki til at brúka so nógva orku upp á besta liðið, sum vit hava gjørt hesi trý seinastu árini.

Hetta sigur Jonhard Vestergaard. Hann er formaður í Sumbiar Ítróttarfelag, og hann ásannar, at talan er um eina tvístøðu:

– Fleiri av spælarunum á besta liðnum hava nátt ein høgan fótbóltsaldur. Men vit hava eisini nakrar ungar spælarar, sum hava góð evni og stóran vilja. Teir hava avgjørt møguleikar at gera seg galdandi í 1. deild. Spurningurin er so, hvussu tað kann lata seg gera, sigur Jonhard Vestergaard, sum eisini gleðir seg yvir, at nakrir blaðungir dreingir eru evnaríkir og um heilt fá ár kunnu gera seg galdandi á besta liðnum:

– Talan verður kortini altíð um eitt stríð, tá tað er eitt so lítið felag sum hjá okkum. Nógvir ungir spælarar fara aðra staðni at arbeiða, til skips ella teir fáa sær útbúgving. Vit kenna treytirnar, og vit fara at hanga í. Men tað verður ikki við fremmandum spælarum á liðnum, sum fáa pengar fyri at spæla fótbólt.

Ætlanin helt fyrstu løtuna

Sumbingar vistu, at um teir skuldu fáa stig ímóti HB, so ráddi nógv um at fáa fyrsta málið. Tað eydnaðist, tá Sasa Tomajek, sum býr og arbeiðir í Klaksvík, smekkaði eitt langskot innum Bárður Johannesen í HB málinum.

Tá vóru 18 minuttir farnir, og málið gav sumbingum eina løtu trúnna uppá, at tað kundi bera til.

Sumbingar tóktust spæla við tveimum aftastu monnum (um tað ber til at siga tað soleiðis). Marlon og Dánjal Johan bakkaðu upp, og jugoslavarnir báðir tóku sær av fremstu álopsmonnunum. Sumbingar vónaðu at halda tørn inntil steðgin. Teir halda sjálvir, at um tað hevði eydnast teimum, so høvdu teir havt møguleikan at fingið í hvussu so er eitt stig. Tað eydnaðist ikki. Teir síðstu fimm minuttirnir undan steðginum vóru dýrir.

Tryggur sigur

Breiddin á HB liðnum er nógv størri, enn hon er hjá sumbingum, og undan steðginum var tað greitt, at tað fór at verða meiri enn torført hjá heimaliðnum at fáa nakað burturúr.

HB vildi ikki hava sitandi á sær, at teir ikki gjørdu sítt fyri at taka av, um FM møguleikin skuldi stinga seg upp. Eftir at heimaliðið var komið framum, umskipaði Ion Geolgau. Allan Mørkøre varð fluttur av vongverjanum og fram á miðvallarplássið í høgru, Hallur Danielsen fór av sentrala miðvallarplássinum og aftur á vongverjan, og liðformaðurin, Ingi Rasmussen, fór av miðvallarplássinum í høgru og inn á mittasta miðvallarplássið, har hann var góður bylgjubrótari, meðan Rói Árting og Allan Mørkøre fóðraðu teir tríggjar ungu menninar, sum mannaðu álopið.

Andrew av Fløtum hevur verið støðugur og vandamikil í ár. Hann skoraði stutt undan steðginum tvey mál, eftir at hann var komin inn úr vinstru, og miðskeiðis í 2. hálvleiki staðfesti Jón Rói Jakobsen, sum í ár veruliga hevur staðfest, at hann er ein klassaspælari, sigurin. Allan Mørkøre legði innfyri úr høgru, og Jón Rói var púra leysur, tá hann við handara stólpan stútaði í málið.

Einstakir HB stuðlar vóru í Sumba. Kanska høvdu teir fýrverk og sjampanju goymda í viðførinum. Hetta kom ikki fram í ljósið, men tað kann goymast til komandi ár. Tá fer HB aftur at gera seg galdandi, og tá fara teir at hava tann lærdómin í viðførinum, at tað skal spælast inntil sísta bríksl – hvørja ferð!

jh

Sumba:
Fróði Mortensen – Nikola Biberdzic,Marlon Kjærbo, Dánjal Johan Joensen, Spasojé Biberdzic – Hans Jákup Thomsen, Sasa Tomajek, Jan Poulsen, Eirikur Joensen, Mortan úr Hørg – Nebosja Veljkovic

HB:
Bárður Johannesen – Allan Mørkøre, Hans á Lag, Símun Eliasen, Janus M. Joensen – Ingi Rasmussen, Hallur Danielsen, Rói Árting– Bárður Mortansson, Jón Rói Jacobsen, Andrew av Fløtum

LÍF hongur í klønum tráði

Við sigrinum á LÍF vann B36 seg upp á fjórða plássið. Leirvíkingar mugu nú spæla tveir dystir eyka, har framtíðar lagnan verður avgjørd Mynd: Álvur Haraldsen

2. deild: LÍF var á vitjan í Havn, har B36 sendi teir norðuraftur við einum 2-1 tapi. LÍF skal nú spæla niðurflytingardyst ímóti B71, meðan B36 tók seg uppá fjórða pláss á stigatalvuni

Jákup Mørk

Einki í spælinum hjá leirvíkingum fyri steðgin bendi á, at teir stríddust fyri lívinum í 2. deild. Støðan var tann undan dystinum, at LÍF skuldi í minsta lagi hava tað eina stigið fyri at sleppa undan einum niðurflytingardysti ímóti B71. Stríðshugurin hjá LÍF var tó lítil, og teir spældu seg ikki fram til teir stóru møguleikarnar. B36 hevði einki at spæla fyri uttan einum fjórða plássi.

B36 hinvegin var nógv vandamiklari í álopsspælinum, og tað eydnaðist eisini at fáa bóltin innum tvær ferðir undan steðginum, men lítið gott fótbóltsspæl var at síggja á niðara vølli í Gundadali leygardagin. B36 liðið hevði mist fimm av spælarunum frá seinasta dysti, og tí vóru fleiri nýggir spælarar at síggja.

Kenneth Jacobsen legði heimaliðið framum miðskeiðis í fyrra hálvleiki. Eftir gjøgnumspæl í høgra borði gjørdist Kenneth leysur miðskeiðis frammanfyri málinum og so var lag á manni at seta bóltin í kassan.

LÍF royndi hesa løtuna at skapa nakað á B36 hálvuni. Onkur vandamikil støða kom í lag, men eingin veruligur møguleiki spurdist burturúr, og LÍF álopið var sum heild heldur tannleyst.

B36 økti til 2-0 stutt eftir. Johnny Samuelsen rann eina sending upp og skuldi leggja innfyri stutt frá baklinjuni, men innleggið fór ístaðin undir uppundir nettakið. 2-0 til heimaliðið, og nú sá svart út hjá LÍF, sum skuldi hava stig frá hesum dystinum.

Í seinna hálvleiki varð Kristian Eliassen settur inn í álopið, og hann vísti seg at vera vandamiklari. Hann varð eisini settur inn fyri viku síðani móti GÍ, og tann útskiftingin gav úrslit ta ferðina, hóast hann ikki skoraði.

LÍF var betra liðið eftir steðgin og hevði bóltin størsta partin av tíðini. B36 hevði ein stóran møguleika eftir steðgin, men málverjin vardi, tá Páll H. Johannesen gjørdist leysur í høgra borði.

Leikliga yvirvágin bar ávøkst miðskeiðis í seinna hálvleiki. B36 verjan ruddaði ikki upp eftir eitt innlegg, og bólturin datt fyri føturnar á Kaj Eli Olsen, sum langaði til. Skotið bar við málverjan, men fór kortini inn. LÍF royndi eftir hetta at fáa útjavnandi málið, sum hevði havt við sær, at LÍF fór framum HB.

B36 verjan stóð tó stinn, og LÍF hevði ongan stóran málmøguleika, eftir at málið varð skotið.

Kappingarárið hjá LÍF er nú longt nakrar dagar, og hetta er triðja árið á rað, at hetta hendir. Tvey tey seinastu árini hevur LÍF tó spælt uppflytingardyst móti Sumba ístaðin fyri niðurflytingardyst sum nú, har mótstøðuliðið verður B71.

B36 endaði á fjórða plássi, og tað eru havnarmenninir óivað nøgdir við, men bronsumerkini kundu tó lættliga hingið um hálsin. Bara eitt stig var upp til TB á triðja plássi.

B36-LÍF 2-1 (2-0)
1-0: Kenneth Jacobsen
2-0: Johnny Samuelsen
2-1: Kaj Eli Olsen